# Vælkomin á vestanstevnu

Gott bygdarfólk. Góðu stevnugestir.

Triðja hvørt ár stendur Miðvágur fyri vestanstevnuni. Soleiðis hevur skipanin verið leingi, og soleiðis verður aftur í ár.

Hetta vikuskiftið fer bygdin at standa í miðdeplinum hjá túsundtals fólkum, ið koma til okkara bygd á stevnu.

Eitt stórt arbeiði er gjørt til tess at fyrireika stevnuna. Tað er tó ein sannroynd at tilboðini eru mong og kappingin hørð frá festivalum og øðrum stórum tiltøkum kring landið.

Hetta hevur kortini ikki tikið hugin frá fólki at gera eitt stórt arbeiði, til tess at leggja eina fjølbroytta og áhugaverda skrá til rættis. Her hava mangar hendur tikið lógvatak saman. Og vit kunnu bara staðfesta, at uttan ein slíkan sjálvbodnan vilja, hevði ikki borið til at fingið stevnuna til tað sum hon verður í ár.

Aðrastaðni í blaðnum er



skráin fyri vestanstevnuna prentað, og her ber greitt til at síggja, at okkurt tiltak er hjá øllum at fara til, líkamikið hvønn áhuga ein hevur.

Síðani seinastu stevnuna í 2005 er nógv hent í Miðvági. Bygdin er vaksin á mongum økjum, soleiðis at eitt ávíst bjartskygnið hevur rátt í bygdini. Men vit hava eisini upplivað keðiligar hendingar, millum annað tað ræðuliga, at 70 fólk vórðu uppsøgd á flakavirkinum í bygdini í farna mánaði.

Men vit eiga virkisfúsið fólk, sum torir at váða nakað tá ástendur. Tí ivist er ikki í, at vit fara at reisa okkum einaferð enn. Vit ætla ikki at gevast á hondum!

Við hesum orðum fari eg at ynskja bæði bygdarfólki og gestum eina góða vestanstevnu.

Vinarliga

**Jóhannes Klein,**
**borgarstjóri**

